## Skeið á Fróðskaparsetri Føroya
### 2007-2008

**Próvskeið í enskum**
a) Skeið til Cambridge Certificate in Advanced English
byrjar *í Jónas Broncks gøtu 25* 18. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.
- Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

**Lærari: Sharon Christiansen, MA.**

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English
byrjar *í Ovastovu í Nóatúni* 17. oktober í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
- Fortreytir: Staðið "Advanced English", málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

**Lærari: Sharon Christiansen, MA.**

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2008.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til **03. oktober 2007**. Nemingatalið er avmarkað; nemingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 1.000 kr.**

Fyri próvtøku í Certificate in Advanced English gjalda nemingar 1.000 kr.
og fyri próvtøku í Certificate of Proficiency in English 1.100 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

TEAM85

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn
**www.setur.fo**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Klaksvíkar Sjúkrahús
700 Klaksvík · Tlf: 45 45 45 · Fax: 45 73 63

## Køksatstøðari/ køksassistent

Í sambandi við barnsburðarfarloyvi, verður søkt eftir avloysara fyri køksatstøðara/køksassistent frá 01.11.07 til 31.08.08. Arbeiðstíðin er 0,5.

Umsøkjarin skal verða útbúgvin køksatstøðari/ køksassistentur.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Kost- og føðslufelagið og Fíggjarmálaráðið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við Tórgerð Dam, leiðandi økonomu tlf. 45 45 45, lokal 202.

Umsókn, saman við avriti av prógvi v.m., verður at senda til Umsjónarmannin, Klaksvíkar Sjúkrahús, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 08. oktober 2007

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

## DEILDARLEIÐARI
### til Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya

Starvið sum deildarleiðari á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum er leyst at søkja. Setanin tekur við 1. november 2007.

**Starvið**
Deildarleiðarin vísir til rektaran og hevur undir sær lærararnar á skúlanum. Deildarleiðarin er vararektari og røkir rektarastarvið, tá rektarin er burturstaddur.

**Ábyrgdarøki**
Deildarleiðarin hevur dagligu, fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing um hendur og hevur undirvísingarskyldu. Deildarleiðarin hevur ábyrgdina av, at útbúgvingin samsvarar galdandi lógum, kunngerðum og reglum og teimum krøvum, ið løggildingin ásetur.

Deildarleiðarin er rektaranum til hjálpar í øllum spurningum um samstarv millum deildirnar báðar, Heilsuskúlan og Sjúkrarøktarfrøðiskúlan, og í málum viðvíkjandi útbúgvingini.

**Faklig krøv**
Sjúkrarøktarfrøðingur við viðkomandi víðariútbúgving á master ella kandidatstøði.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. verður at senda til:

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
**Jónas Broncks gøta 25**
**FO-100 Tórshavn**
**att.: Súsanna M. Mortensen, v. rektari**

og skal vera Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 01.10.2007

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 352 250 ella 215 990 ella við at senda teldupost til susanna.m.mortensen@skulin.fo.

Sí annars heimasíðu skúlans: www.srfs.fo

Merk umsóknina: »Deildarleiðarastarv«

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

## HEILSUSKÚLI FØROYA á Tvøroyri

søkir eftir fólki at avloysa lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. november 2007 til 31. oktober 2008.

**Lýsing av starvinum**
Starvið er á brøki 0,75, sum er 30 tímar um vikuna.

Starvið fatar um undirvísing av heilsurøktaranæmingum, fyrireiking og tilrættalegging í sambandi við undirvísing, samábyrgd av at gera útbúgvingar- og undirvísingarætlanir og at skipa fyri royndum.

Undirvísingin er løgd til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir í tøttum tvørfakligum samstarvi við hinar lærararnar á skúlanum.

Útbúgvingarnar eru í støðugari menning. Sum lærari á skúlanum ert tú við í menningararbeiðinum og fært soleiðis ávirkan á útbúgvingina og lærarastarvið.

**Faklig krøv**
Útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur

**Førleikakrøv**
Námsfrøðiligar royndir ella onnur eftirútbúgving, skeið v.m., umframt royndir innan psykiatriska sjúkrarøkt, geva fyrimun.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Upplýsingar**
Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til deildarleiðaran á Heilsuskúlanum, Susanne Høgh Olesen, á telefon 22 48 55.

**Umsóknir verða sendar til**
**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
**Jónas Broncks gøta 25**
**FO-100 Tórshavn**
**att.: Súsanna M. Mortensen, v. rektara**

og skulu vera Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum í hendi í seinasta lagi 01.10.2007

Merk umsóknina: »Starv á Heilsuskúlanum«

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

## Floksleiðslufundur

Boðað verður til floksleiðslufund í hølunum hjá Losjuni á Tinghúsvegi 18, leygardagin 22. september kl. 11.30.

**Føroya Javnaðarflokkur**

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820